# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GJØGNUMSKYGNI Í NÝGGJA BANKA

»Absolutt, ja!«

So greiður var nýggi stjórin í tryggingarrisanum, Tryggingarfelagnum Føroyar, tá útvarpið fríggjadagin spurdi hann, um tryggingarfelagið framvegis er áhugað í at keypa Eik Banka.

Regin Hammer eitur nýggi stjórin í stóra sínamillum tryggingarfelagnum. Vit ynskja honum hjartaliga tillukku og bestu eydnu í starvinum. Men vit fara samstundis at mæla honum til at gera nakrar broytingar í felagnum. Sum stjóri í tryggingarfelagnum hevur Regin Hammer sera stórt vald - ja, eins og stjórarnir í Eik Banka á sinni, so liggur í veruleikanum alt ov nógv vald hjá stjóranum.

Vit vístu á henda trupulleika á hesum stað fyri júst einum mánaði síðani, tá tað kom fram, at Tryggingarfelagið Føroyar var áhugað í at keypa Eik Banka. Vit síggja longu nú, at samansetingin í Eik Banka var ein skandala. Eik Grunnurin átti meirilutan í bankanum og harvið alt valdið. Hesum løgna grunni stjórnaði stjórn bankans, og tí kundi tað næstan bara endað galið.

Tað var Jørn Astrup Hansen, sum segði, at var ein vanlukka, at Sparikassar sluppu at broyta seg til bankar, uttan at bygnaðurin kring felagið varð broyttur. Tí at tað gav leiðsluni sjálvari alt ov víðar heimildir, tí tað í veruleikanum var leiðslan, sum stýrdi nevndini - og ikki øvugt.

Tryggingarfelagið er ikki ólíkt Eik Grunninum. Tað ljóðar so pent, at øll, sum hava tryggingar hjá felagnum, eiga felagið. Nevndin í Tryggingarfelagnum er vald av umboðsráðnum, sum er eitt stórt og tungt apparat, sum neyvan flytir nakað sum helst. Sum ein gomul kommunistisk leivd, ið verður samantvinnað við eina modernaða marknaðardrivna fyritøku. Uppstillingin til umboðsráðið er torgreið og margháttlig, og mannagongdin, hvussu atkvøðuseðlar verða býttir út er beinleiðis ódemokratisk, har tað valevnið, ið megnar at fáa tryggingarfelagið at senda flestar atkvøðuseðlar út, hevur besta kjansin. Bara tað at felagið ikki sendir øllum tryggingartakarum atkvøðuseðlar er misteinkiligt - er tað veruliga so, at leiðsla, nevnd og umboðsráð í tryggingarfelagnum ikki vilja hava, at øll skulu atkvøða?




Fyri at sleppa undan misteinkiliggering, so eigur nýggja leiðslan alt fyri eitt at fáa gjøgnumskygni í felagið - skipið næsta umboðsráðsval á vanligan demokratisk hátt!

Og skal TF Holding keypa Eik - kanska saman við landsstýrinum, so skal hetta sjálvandi vera eitt krav, at tryggingarfelagið verður umskipað soleiðis, at tað lýkur tær organisatorisku reglur, sum galda fyri eina sunna fyritøku á privata marknaðinum.

**Nýggi stjórin eigur at fáa meira gjøgnumskygni í felagið**

# V sagt øllum fólkum upp

Vikublaðið V hevur sagt øllum starvsfólkunum úr starvi, og blaðið kemur ikki út hesa vikuna. Nú samráðast útgevararnir við onnur um samstarv, so blaðið kann koma útaftur.

Seinastu mánaðirnar hava føroyingar fingið blaðið V borið ókeypis heim. Blaðið hevur seinastu tíðina verið vikublað, men hesa vikuna verður einki V borið út til føroyingar. Útgávan er fyribils steðgað.

Rógvi Róin, sum er stjóri í Mess Media, ið gevur V út, váttar, at øll starvsfólkini á V eru søgd úr starvi. Seks fólk vóru í fulltíðarstarvi á V umfram tveir freelancarar.

Mess Media er nú í samráðingum við aðrar partar um samstarv, so at V kann koma útaftur.




# Framtíðin er borgarlig

Í Hvonn Live sendingini hjá Rás2 leygarkvøldið var politiskt orðaskifti á skránni. Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, og Helena Dam á Neystabø úr Javnaðarflokkinum tosaðu um dagsins politikk.

Mangt og hvat varð havt á lofti, men Jørgen Niclasen vissaði um, at tað stendur ikki so illa til við borgarligum politikki í Føroyum.

Hann segði m. a. hesi mergjaðu orðini:

»Eg síggi fyri mær, at framtíðin er borgarlig...«

Kanska hann hevur rætt. Men lítla løtu seinni segði hann soleiðis:

» - Eg siti í samgongu við tveimum sosialdemokratiskum flokkum. Tí sosialdemokratiska Javnaðarflokkinum og tí sosialdemokratiska Sambandsflokkinum. Og í andstøðuni hava vit sosialistiska Tjóðveldi...«

Spurningurin er so, hvar tann borgarliga framtíðin er - ella um Jørgen Niclasen ímyndar sær, at Fólkaflokkurin - sum umfram veljarar nú eisini missir tingmenn - einsamallur skal garantera borgarliga framtíð, tá Sambandsflokkurin er farin so langt í bakborð.





**Ikki danska men besta dømi**

ANNIKA SMITH
KJAK Á SÍÐU 35



**Fáur lýgur meira enn milliardina**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 29

# Regin nýggjur stjóri



Gunnar í Liða leggur frá sær og flytir til Noregs til unnustu.

Regin Hammer er nýggjur stjóri í TF Holding og Tryggingarfelagnum Føroyar.

Aftan á fleiri enn 15 ár í TF samtakinum, harav fleiri enn 10 ár sum forstjóri, hevur Gunnar í Liða avgjørt at leggja frá sær sum forstjóri á nýggjárinum.

- Eg havi verið sera glaður fyri tíðina í TF samtakinum. Hesi árini hava verið tey bestu í mínum arbeiðslívi, men av persónligum ávum havi eg avgjørt at gevast um ársskiftið. Eg eri fegin um, at TF samtakið nú er sterkari enn nakrantíð og væl brynjað at taka ímóti teimum avbjóðingum, ið standa fyri framman, sigur Gunnar í Liða.

Nýggjur forstjóri í TF Holding og Tryggingarfelagnum Føroyum verður Regin Hammer, sum er varastjóri í TF Holding. Hann tekur við starvinum 1. januar 2011.

Um orsøkina til, at hann gevst í stjórastarvinum sigur Gunnar í Liða, at hann hevur ein maka, sum býr í Norra, og nú vilja tey liva eitt lív saman.

- Vit hava búð í hvør sínum landi í fýra ár, og nú vilja vit liva saman, segði Gunnar í Liða við Rás2 fríggjadagin.

Í tíðindaskrivi boðið nevndin í Tryggingarfelagnum frá, at hon ynskir Gunnari í Liða blíðan byr framyvir, nú hann hevur valt at leggja frá sær.

- Nevndin hevur samstundis við valinum av Regin Hammer sum nýggjum forstjóra tryggjað, at Tryggingarfelagið Føroyar og TF Holding halda fram á somu kós sum higartil. Vit ynskja Regini góða eydnu við starvinum, sigur Birgir Mohr, nevndarformaður.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*